# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein




## HEIMSINS SKJÓTASTI SIGUR SÍNA SØGU

Usain St. Leo Bolt er føddur á Jamaica fyri 24 árum síðani, og hann er í løtuni skjótasti maður í heiminum. Einki annað fólk í heiminum hevur runnið hundrað metrar so skjótt sum hann (9,69 sekund). Nú sigur Usain Bolt søguna um seg sjálvan í nýggjari bók.

**USAIN BOLT**
My Story
HarperSport

## FÓLKAHEILSU-RENNING



Hetta vikuskiftið er árliga Fólkaheilsu-renningin. Renningin er fyri øll, og tað verður ikki kappast, tað ræður um at vera við. Í kvøld verður runnið í Runavík. Í morgin verður runnið í Klaksvík, á Sandi, í Miðvági og á Tvøroyri. Sunnudagin er renningin í Havn.

**FÓLKAHEILSURENNING**
Havn, Klaksvík, Runavík, Sandur, Miðvágur og Tvøroyri.
Fríggjadagin 3/9-Sunnudagin 5/9



## PÍLAGRÍMSFERÐ Í SANDOYNNI

Danski presturin Kristine Hertbech er á odda fyri pílagrímsferð í Sandoynni um vikuskiftið. Ferðin byrjar og endar í Skopun, og gingið verður ymsastaðni í oynni. Randi Meitil er ferðaleiðari, og Kristine Hestbech fer á ferðini at halda andaktir og geva fólk orð at hugsa um.

**PÍLAGRÍMSFERÐ**
Sandoy
Leygardagin 4/9-Sunnudagin 5/9



## LØGFRØÐINGURIN OG DEYÐIN

Nathan er løgfrøðingur og hevur eftir øllum at døma eitt gott lív. Men hóast undanvind í arbeiðnum er privalítið tómligt, og skilnaðurin frá konuni merkir hann framvegis. So møtir Nathan Doktor Kay, sum sigur seg kunna merkja, nær fólk standa yvirfyri deyðanum – og so henda løgin ting.

**THE MESSENGER**
dvd-filmur
Frá týsdegnum 7/9



Skrivstovuhøli í serflokki til leigu

Bygningurin hevur seinastu árini hýst nógvum framfýsnum fyritøkum; t.d. Elektron, Reproz og Atlantstøkni. Hesar fyritøkur eru vaksnar úr reiðrinum, og eru farnar í størri høli. Nú verður skjótt klárt til næstu fyritøkuna. Er tað tín fyritøka?

Meiri fæst at vita við at ringja til Árna Ellefsen, stjóra, á telefon 347 112, ella við at senda teldupost til arel@nema.fo

Fæst hóskandi boð, verður bygningurin seldur.

Bygningurin hevur:

- 4 hæddir
- Luftskiftisskipan
- Góð parkeringsviðurskifti
- Gott útsýni
- Allar nútímans hentleikar

SENDISTOVAN

Nema P/F | Brekkutún 4 | Postboks 109 | FO-110 Tórshavn | Tel: +298 347 347